# Hamilton vann Formil 1

Seinasta kappkoyringin í Formil 1 var í Brasil um vikuskiftið, og endin var, at bretin Lewis Hamilton vann kappingina. Hann koyrir fyri Ferrari, og í seinastu kappingini eydnaðist honum í evstu løtu at koyra seg fram á ein fimta pláss, sum tryggjaði honum meistaraskapin. Lewis Hamilton er tann yngsti førarin, sum vinnur Formil 1 kappkoyringina.



# Lampard er tann besti

Venjarin hjá Chelsea, Luiz Felipe Scolari, heldur nógv av miðvallarspælaranum Frank Lampard. - Lampard kann skora eini 150 mál á sínari yrkisleið. Hann skorar í triðja hvørjum dysti, og tað er fantastiskt av einum miðvallarspælara. Eg haldi, at vit í ár mugu umhugsa, hvør veruliga er tann besti spælarin í heiminum, sigur Scolari. Frank Lampard sjálvur hevur ikki hug at gera so nógv burtur úr sær. Hann sigur seg fyrst og fremst hugsa um at vinna Champios League.

# Tiltrongt elitukjak



**Breiddin er neyðug, men skulu tey bestu lyftast, so er neyðugt at Føroyar gera sær greitt, hvat verulig elituítrótt merkir**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er at fegnast um, at fokus nú eisini verður sett á elituítrótt í Føroyum. Hetta við pallborðsfundi og kjakið, sum verður í Útvarpshøllini í kvøld.

Tí hóast vit her á landi ofta erpa okkum av teimum úrslitum, sum fremstu ítróttarfólk okkara hava fingið, so er tað sjáldan so, at hesi eru komin orsakað av teimum. Men heldur eru hesi komin hóast vánaligu karmarnar, sum føroyska elitan hevur at virka undir.

Og veruleikin er eisini, at fyri flestu av okkara elitufólkum er galdandi, at elituítrótt ikki er nakað, sum tey hava lært í Føroyum. Undantakið eru kanska fremstu svimjarar okkara, sum tó hava fingið íblástur frá føroyingum, sum hava lært elitumenning uttanlands. Fyri so at siga øll hini er galdandi, at elituítróttin er nakað, sum tey hava fingið smakk fyri uttanlands. Antin í lestrarumhvørvinum, ella tí tey hava valt at royna sína ítrótt uttanlands.

Og hetta hvørki má ella kann vera rætt. Sjálvandi er tað ein høvuðsuppgáva hjá ítróttini at arbeiða breiddini at frama. Uttan breiddina verður eingin elita. Men samstundis mugu ítróttarFøroyar so ella so hava eitt organ, sum kann eggja og stuðla til elitumenning. Eitt skifti varð Framá Føroyar sett á stovn sum ein pendantur til Team Danmark, men nakra veruliga elitusatsing gjørdist talan ongan tíð um. Eina mest tí jantulógin slapp at ráða, og at midlarnir úr grunninum tí vórðu alt ov smábýttir.

Og her mugu vit tora at skera ígjøgnum. Tá ítróttin nærkast elitustøðinum, er hetta fyri ein stóran part eisini eitt farvæl til sosiala partin av spælinum. Skulu vit tá lyfta okkara fremstu enn longur, er neyðugt við knallharðari útveljing, og so mugu vit tora at geva nógv til nøkur fá.

Tað kann væl vera, at nøkur vilja kalla hetta fyri kalda kynismu. Men lítil ivi er um, verður hetta gjørt á rættan hátt, so verður samlaða avkastið eisini fleirfalt.

Bosnia-Føroyar 28-45 (21-12):

# Skotnir niður í Bosnia

**Føroyska manslandsliðið í hondbólti var aftur fyri stórtapi, tá teir leygardagin spældu í Bosnia**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Heini Hanusarson varð aftur besti føroyski málskjúttin. Hesa ferð skeyt hann níggju av føroysku málunum*
*savnsmynd*

Næsta stórtapið upp á eina viku gjørdist veruleiki, tá føroysku hondbóltsmenninir leygardagin spældu á útivølli í Sarajevo.

Fyrstu lítlu løtuna av dystinum megnaðu okkara annars at halda fast í mótstøðuni, men so skrædnaði av álvara. Bosniska álopsspælið kom veruliga upp at koyra, og so líðandi vórðu føroysku málverjarnir skotnir í senk.

Eins og móti Serbia mikukvøldið, so hevði føroyska liðið trupulleikar av, at ov nógv álop endaðu uttan veruliga skotroynd móti mótstøðumálinum. Tað gav Bosnia fleiri møguleikar at kontra, og so vóru føroysku málverjarnir prísgivnir.

Eftir steðgin gekk føroyingunum nakað betur. Í øllum førum sótu bóltarnir nú oftari í mótstøðunetinum, men tað komst nú eisini av, at Bosnia hevði hug at geara nakað niður, nú sigurin kortini var vísur.

Føroysku málini: Føroysku málskjúttarnir vóru: Heini Hanusarson 9, Finnur Hansson 7, Hans Áki Dal-Christiansen 3 (2), Tróndur Kragesten 2, Ingi Olsen 2, Dánjal Tórgarð 1, Karl Herup Olsen 1, Áki Mørk 1, Esbern Patursson 1, Sámal Joensen 1.

# Tryggingarfelagið skrivað undir við Neistan

**Fríggjadagin skrivaði Tryggingarfelagið Føroyar undir avtalu, sum ger felagið til høvuðsstuðul hjjá besta kvinnuliðnum hjá Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

- Kvinnurnar hjá Neistanum hava seinastu árini verið millum fremstu hondbóltslið í landinum. Tey virðir, ið tær umboða eru nøkur, ið vit sum felag fegin vilja stuðla undir og vera við til at styrkja. Vit eru tí fegin um, at gerast høvuðsstuðul hjá besta kvinnuliðnum hjá Neistanum, og vóna, at vit harvið eisini kunnu vera við til at stuðla undir enn betri úrslitum. Tryggingarfelagið Føroyar er sum heild stórur stuðul hjá føroyskum ítrótti og føroyskari mentan, og avtalan við Neistan er ein partur heildarætlanini hjá felagnum, sigur Kristina Háfoss, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyum í tíðindaskrivi, sum er sent miðlunum.

Neistin fegnast eisini um nýggju avtaluna við Tryggingarfelagið Føroyar, ið fer at geva kvinnuliðnum neyðuga fíggjarliga grundarlagið, til at fáa so góðar umstøður sum møguligt í komandi kappingarári.

- Fyri Neistan er tað av alstórum týdningi, at vit hava góðan samstarvspart, ið kann veita okkum neyðuga fíggjarliga tryggleikan komandi tíðina. Hetta gevur okkum møguleika at geva leikarunum so góðar umstøður sum møguligt, og skapar harvið grundarlag fyri góðum úrslitinum. Vit kunnu tí ikki annað enn gleðast um, at Tryggingarfelagið Føroyar hevur valt at gerast samstarvsavtalu við júst okkum, sigur Kjartan Thomasen, formaður í Neistanum.




*Kristina Háfoss og Kjartan Thomassen skrivaðu fríggjadagin undir sponsorsáttmálan millum Tryggingarfelagið Føroyar og Neistan*